Annita á Fríðriksmørk, landsstýriskvinna, setti ráðstevnuna

»Skúlin fyri øll, hvussu fáa vit hann«:

Okkara fremsta mál skal vera samstarv

– Vit hava øll skyldu til at taka saman hendur og royna at betra um møguleikarnar hjá barninum. Sum landsstýriskvinna vil eg vísa á, at vit hava dugnalig starvsfólk í Almannaverkinum, Heilsuverkinum, kommunalu stovnunum, Sernámsdeplinum og í fólkaskúlanum. Eg fari at nýta høvi til at heita á tey um saman við okkum at seta samstarv og positivan hugburð fremst í arbeiðinum segði landsstýriskvinnan í mentamálum, Annita á Fríðriksmørk, tá hon leygardagin setti ráðstevnuna hjá Javna, "Skúlin fyri øll, hvussu fáa vit hann"

RÁÐSTEVNA
Myndir: Maria Olsen

Tað var felagið JAVNI, sum skipaði fyri ráðstevnu undir heitinum: "Skúlin fyri øll, hvussu fáa vit hann". Landsstýriskvinnan takkaði Javna fyri innbjóðingina og áheitanina um at siga frá ætlanum sínum innan sernámsfrøði, sum landsstýriskvinna á undirvísingarøkinum.

Út frá spurninginum "Hvørjar ætlanir eg havi sum landsstýriskvinna viðvíkjandi undirvísing av børnum við breki/ menningartarni." legði hon fram sjónarmið síni.

Hon vísti á, at tað eru tveir mánaðir síðan, hon tók við sum landsstýriskvinna, og tað sum hevur verið frammarlaga í arbeiðinum og ætlanunum í Mentamálaráðnum hesa tíðina, eru fyrst og fremst broytingar í lógini um sernámsfrøði, greining av markamótstrupulleikum millum Mentamálaráðið og hini aðalráðini, tankar um møguligan miðnámsskúla fyri børn við breki og skúlatilboðið fyri børn við breki í Runavík.

Viðgerðin av sernámsfrøðiliga økinum, tað veri seg í tilmælinum frá 2001, frá orðaskiftinum á tingi í 2003 og frá hoyringarfundunum og skrivligu skrivunum frá áhugafeløgunum í 2002, hevur vist ella avdúkað, at fleiri av samrøðupartunum, sum hava luttikið í tjakinum og viðgerðini, hava eina felags fatan av teimum trupulleikum, sum eru í skipanini, og eisini eina felags fatan av, hvussu loysnirnar skulu vera. Tað eru hesir felags tankar og loysnir, sum til endans skulu takast við í tilevningini av nýggju lógina um sernámsfrøði, í nýggjar og broyttar mannagongdir og í tí samstarvi, sum má skipast millum Almannamálaráðið, Familju- og Heilsumálaráðið og Mentamálaráðið.

Tað fyrsta, sum nú liggur fyri framman

Um lógina segði landsstýriskvinnan m.a.:

- Vit eru farin undir at gera lóg um sernámsfrøði, og hava ávísar hugsanir um innihaldið í lógini. Tað er líkt til, at lógin verður rættiliga umfatandi, og ætlanin er at hon í stórstan mun skal hava støði í tí, eg havi nevnt í hesum fyrilestri. Tað verða nakrir høvuðspartar ella kapittul í lógini m.a. um:

- Høvuðsbygnaðin í allari føroysku serundirvísingarskipanini
- Greiningarmiðstøðinaleiðsla innhald
- Viðurskiftini í Skúlanum í Sernámsdeplinum
- Serstovurnar kring landið - heimildir, staðseting
- Rættindi einstaka barnsins herundir til eina heildarætlan
- Samstarvsráð við luttøku av starvsfólki úr øðrum ráðum
- Kæruviðurskifti

Tað er ikki ætlanin at gera lógina sum eitt skriviborðsarbeiði. Tað er neyðugt at viðgera høvuðspartarnar saman við teimum, sum varða av økinum. Men lat tað vera sagt beinanvegin: Tað er ein ørgrynna av ymiskum trupulleikum ella partsmálum, sum mugu loysast, áðrenn ella samstundis sum lógin verður gjørd.

Serstovurnar

Um serstovnarnar segði Annita á Fríðriksmørk m.a.: - Eg kann til dømis vísa á, at virksemið hjá serstovunum kring landið sjálvandi fyrst skal viðgerast saman við kommunalu myndugleikunum, skúlaleiðslunum Sernámsdeplinum og serlærarum kring landið, áðrenn endalig støða verður tikin til reglur og lógartekst. Hetta arbeiði er farið í gongd, men tað má taka ta tíð, tað skal. Embætisfólk eru sett til at gera hetta arbeiði, og skulu tey í tøttum samstarvi við stjóran í Sernámsdeplinum og onnur skipa fyri arbeiðinum.

Serstovurnar vera eitt týdningarmikið lið í skipanini. Tað er ikki enn avgjørt hvussu nógvar serstovur skulu vera í landinum, men eitt tal millum 7 og 9 er nevnt. Serstovurnar skulu vera eitt slag av námsfrøðiligum, sálarfrøðiligum og sosialum rágevingardepil fyri foreldur, stovnar og skúlar í einum ávísum øki. Ætlanin er at fólk við serútbúgving skulu setast í starv í serstovunum. Tað er ein avgerandi fyritreyt fyri at fáa skipanina at virka, at Almannamálaráðið og Familju- og Heilsumálaráðið er við í toyminum í serstovunum. Tað kundi hugsast, at ráðini vóru felags um serstovuna, og fólk úr øllum ráðunum t.v.s. sosialráðgevarar, heilsusystrar o.o. starvaðust ein part av arbeiðstíðini í serstovuni. Serstovan skal taka sær av einstaka barnum frá byrjan av, Í samráð við Heilsuverkið, Almannaverkið, Kommununa og Sernámsdepilin skal hon vera við til at greina trupulleikunum og gera eina ætlan fyri barninum í samráð við foreldrini og syrgja fyri at ætlanin verður fylgd. Ætlanin skal eisini fata um frítíð og familjuviðurskifti, og tað er tí alneyðugt at Almannamálaráðið er partur av serstovuni. Serstovan skal eisini fyri Sernámsdepilin umsita tímarnar til serligan tørv og vera ráðgevandi og vegleiðandi í sambandi við alla serundirvísing í økinum.

Serstovurnar skulu ikki vera smáir serskúlar. Mín fatan av hesum viðurskiftunum er, at kommununar í einum øki eiga at samstarva um at loysa hølistrupulleikarnar í sambandi við undirvísing av børnum við serligum tørvi. Kommununar eiga í samstarvi at velja ein av skúlunum í økinum til at vera tann skúlin, sum skal taka sær av ringastu næmingunum við serligum tørvi. Landið vil so lata læararakreftir til hesa undirvísingina. Hølisviðurskiftini eiga kommununar at taka sær av, meðan landið letur starvsfólki. Tað kemur alt ov ofta fyri at skúlar ella kommunur, sum liggja tætt við hvørja aðra royna at losya trupulleikarnar einsamallar. Úrslitið er ofta, at vit fáa eina vánaliga undirvísing og einsamallar útbrendar lærara. Eg vóni at hesi viðurskiftini kunnu broytast, og eg fari at tosa við kommununar um hesi viðurskiftini.

Tað er ein rød av avgerðum, sum eg sum landsstýriskvinna má taka, og tí kemur bæði tað fyrreikandi arbeiðið og sjálvt lógararbeiðið at verða fylgt neyvt av mær. Ein av spurningunum er eisini um, í hvussu stóran mun reglur o.a. skulu setast í verk við ásettum skrivligum tænastuboðum og mannagongdum heldur enn í kunngerðar og lógarteksti. Henda spurning ætli eg mær eisini at taka upp við hini aðalráðini.

Markamóttrupulleikar

Annita á Fríðriksmørk vísti síðani á, at Mentamálaráðið hevur saman við Almannamálaráðnum og Familju- og Heilsumálaráðnum luttikið í einum arbeiðsbólki, sum hevur til uppgávu at útgreina teir trupulleikar, sum hesi ráðini eru felags um. Hon segði, at tað elvir til ótryggleika og vónloysi, tá foreldur at børnum við breki ganga oyðimarkargongd millum stovnar og ráð fyri at fáa hjálp, vegleiðing ella kunning. Tað skal nógv orka til, og ofta steðgar málið upp, ella fæst ein vánalig loysn, tí myndugleikar skumpa tað frá sær til onkran annan myndugleika. Landsstýrið er býtt upp í aðalráð, og undirvísing, ansing, ráðgeving og viðgerð av barnum fer fram í stovnum undir fleiri ymiskum ráðum. Og hon helt fram:

- Av og á hevur verið frammi í tjakinum at lata øll tiltøk, sum hava við børn við breki at gera, fara fram í einum einstøkum aðalráði, hetta kann gerast við at flyta málsøkið til eitt ráð. Hetta kann ljóða sum eitt gott hugskot, og eg vil fegin leggja stóran dent á, at tað eru øki, sum helst eiga at verða flutt millum ráðini fyri at fáa betri og skjótari málsviðgerð og eina heildarloysn, men í nógvum føri er hetta trupult, og vil ikki vera nøkur betur loysn. Ein partur av trupulleikunum í sambandi við markamóttrupulleikar kann betur loysast við betri samstarvi millum ráðini, millum stovnarnar og millum starvsbólkar. Felags arbeiðsbólkurin fer at koma við einum tilmæli um framhaldandi arbeiði. Hetta fari eg at kanna nærri, tá tað kemur.

Fleiri fyrilestrar vóru á ráðstevnuni

Skúlatilboð til ung við breki

Til endans nevndi landsstýriskvinnan tvey av tiltøkunum, sum hava verið frammi í fjølmiðlunum. Fyrrverandi landsstýriskvinnan Annlis Bjarkhamar legði nógva orku í at skapa eitt skúlatilboð til ungfólk við breki, og tað eydnaðist eftir stutta tíð at skapa lógarkarmar, fáa figging og at seta verkætlanina í gongd.

- Tað er at frøast yvir. Hetta er eitt royndartiltak, sum skal samskipa innlæring, arbeiði, bústað og frítíð. Ætlanin er, at hetta skal verða eitt skúlatilboð, sum leggur dent á upplæring og praktisk arbeiði og frítíð. Hetta fyrsta skúlatilboðið er staðsett í Runavík og skal í fyrsta umfari vara í trý ár. Í lógini eru møguleikar fyri at gera eitt nýtt skúlatilboð aðrastaðni í Føroyum, men enn er ikki støða tikin til, um og nær eitt tílíkt tilboð verður skipað aðrastaðni. Farið verður í gongd í Runavík fyrst í komandi ári. Leiðari er settur, og hesin fer saman við nevndini at seta fólk og gera neyðugar umbyggingar av hølunum. Ætlanin er at meta og eftirmeta skúlatilboðið m.a. fyri at finna útav um hetta er ein gongd leið framyvir. Royndirnar frá hesum skúlanum skulu brúkast til at gera næsta skúlatilboðið og kunnu eisini brúkast til at fyrreika ein møguligan miðnámsskúla fyri brekað, sum hevur verið umrøddur í fjølmiðlunum. Forkvinnan í Javna umræddi ein møguligan miðnámaskúla í sjónvarpinum, og eg beit merki í, at hon vísti á, at innihaldið í stóran mun skuldi vera ítriv, praktisk arbeiði og mentanartiltøk. Hetta er í tráð við ætlanirnar í sambandi við skúlatilboðið í Runavík. Eg skal tó leggja dent á, at eingin politisk støða er tikin til spurningin um miðnámsskúli fyri brekað skal gerast ella ikki.

Einstaka barnið

Og landsstýriskvinnan endaði framløgu síni við hesum orðum:

- Nú havi eg mest tosað um skipanir, lógir og mannagongdir, men tað, sum altíð eigur at vera miðdepilin í øllum okkara ætlanum og arbeiði, er einstaka barnið, sum ber brek og familjan hjá tí. Vit eiga at hava í huganum, at alt, sum gjørt verður, skal gerast fyri at betra um lívið og møguleikarnar hjá barninum.

Vit hava øll skyldu til at taka saman hendur og royna at betra um møguleikarnar hjá barninum. Sum landsstýriskvinna vil eg vísa á, at vit hava dugnalig starvsfólk í Almannaverkinum, Heilsuverkinum, kommunalu stovnunum, Sernámsdeplinum og í fólkaskúlanum. Eg fari at nýta høvi til at heita á tey um saman við okkum at seta samstarv og positivan hugburð fremst í arbeiðinum.

Okkara fremsta mál skal vera samstarv, segði Annita á Fríðriksmørk, tá hon setti ráðstevnuna. (Vit fara at venda aftur til hana í seinni blað).

Ung syngja, tá ráðstevnan hjá Javna verður sett